

Teir fýra hetlendingarnir avmyndaðir úti í landsstýrinum seinnapartin týsdagin. Frá vinstru: Lewis Smith, convener, Jim Smith, viceconvener, Alistair Cooper, divisional manager resourcer, og Malcolm Greem, chief executive

*Mynd: Diml / Jens Kr. Vang*

# Hetlendskir oljumenn á vitjan í Føroyum

**Samstarv:** – Eg ivist ikki í, at Hetland kann geva føroyingum ráð um oljuvinnu, og vit kunnu eisini bjóða føroyingum fasilitetir í Hetlandi, um tað skal vera.

Hetta sigur Lewis Smith, sum er »convener« í »the Shetland Island Council«, sum hevur havt umboð í Føroyum á vitjan.

EMIL L. JACOBSEN

Í døgunum 22.- 24. januar vóru fýra umboð fyri »the Shetland Island Council« (SIC) á vitjan hjá landsstýrinum.

»The Shetland Island Council« stendur fyri øllum hetlendska oljuflutninginum, oljumenningini o.ø.

Nevndin hevur 26 limir, sum eru býttir upp í 9 nevndir.

Formaðurin í nevndini ber heitið »Convener«.

– Vit hava umleið 2.500 fólk í arbeiði. Tað eru lærarar, arbeiðarar, »road-workers« o.o., sigur Malcolm Greem, sum er »chief executive« í SIC.

Hann sigur, at endamálið við vitjanini er at styrkja sambandið millum Føroyar og Hetland, og serliga millum SIC og Oljuráðleggingarnevndina.

– Eg haldi, at vit kunnu læra nógv hvør av øðrum, sigur Malcolm Greem.

– Vit hava 20 ára royndir í oljuvinnuni, sigur hann.

Lewis Smith, sum er »convener«, sigur, at føroyingar og hetlendingar nú hava havt regluligt samband í nakrar mánaðar.

– Eg ivist ikki í, at Hetland kann geva føroyingum ráð um oljuvinnu, og vit kunnu eisini bjóða føroyingum fasilitetir í Hetlandi, um tað skal vera, sigur hann.

### Føroyingar hava sjálvsálit

Seinast í 60'unum kom verulig gongd á oljuvinnuna í Hetlandi, og í 1978 varð ein terminalur gjørdur í Sullom Voe.

Meginparturin av bretska oljuútflutninginum fer gjøgnum henda terminalin, og í løtuni stendur hetlendska oljuvinnan fyri 3% av bruttotjóðarúrtøku Stórabretlands.

Á vitjanini vóru teir fýra hetlendingarnir m.a. í Norðurlandahúsinum og í Listaskálanum, og teir vóru sera vælnøgdir við vitjanina.

– Eg havi eina kenslu av, at føroyingar hava stórt sjálvsálit, og at tit vita, hvat tit gera, sigur Malcolm Greem.



Sullom Voe, stóra oljuhavnin í Hetlandi.

**Vil du være Au pair**

**eller vil du blot lære om børneopdragelse, pædagogik m.m.? Så tag på 4 eller 5 mdrs. kursus på Nordfyn!**

Vi underviser i barnepleje, psykologi, pædagogik, moderne madlavning, engelsk, tysk, første hjælp m.m. Moderne undervisning på PC'er (en til hver elev). Studierejse til Europa eller Nordafrika. Praktikperiode. Brug kurset som forberedelse inden start på Au pairjob (skolen skaffer dig, hvis du ønsker det)... eller brug det blot til at få nye venner, mange erfaringer og »skaffe dig points«. Start: 29. januar, 4. marts og 5. august (5 måneder). Ring og hør nærmere og få tilsendt brochure

+ 48 79 36 60

**Nordfyns Husholdningsskole 5400 Bogense**

# Semja kann føra til endurgjaldskrav

Í kjalarvørrinum á semjuni millum landsstýrið og Lærarafelagið viðvíkjandi serlæraraútbúgvingini, kann landsstýrið nú rokna við at fáa eitt endurgjaldskrav frá Starvsmannafelagnum uppá 15 mió. kr.

NICLAS JOHANNESEN

Jákup Danielsen, formaður í Starvsmannafelagnum, heldur nevniliga, at parallellur kann dragast millum verkfallið hjá Starvsmannafelagnum í fjørvár og verkfallið, sum Lærarafelagið júst hevur verið í.

Munurin er tó, at meðan Starvsmannafelagið mátti rinda sínum fólki løn fyri verkfalsdagarnar, er landsstýrið gingið við til, at lærararnir fáa løn fyri verkfalstíðina, umframt at teir fáa undirvísingartíðina aftur.



Jákup Danielsen: Tað er rímiligt at umhugsa at stevna landsstýrinum

### Skapt præsedens

Jákup Danielsen sigur, at við hesi semjuni hevur landsstýrið skapt præsedens fyri, at lønin eigur ikki at vera tikin frá almennum starvsfólki, sum eru í verkfalli.

– Hetta er eitt prinsippielt mál. Tí halda vit, tað er rímiligt at umhugsa spurningin at stevna landsstýrinum í hesum máli, sigur Jákup Danielsen og vísir á, at tað var ikki ókent fyrr, at almenn starvsfólk fingu løn fyri verkfalsdagarnar, tá viðurskiftini komu í rættlag aftur.

Orsøkin til verkfallið í fjør var, at Starvsmannafelagið í február 1993 gekk við til eina fyribils lønarlækking uppá 8,5 prosent. Eftir drúgt verkfall komu partarnir ásamt um, at starvsfólkini fingu helvtina av hesi lønarlækking aftur og at hin helvtin skal vera tikin upp aftur til samráðingar í 1997.

